

Konsert við „Húsakórinum"í Vestmanna Skúla:

# Teskandi pianissimo og brúsandi forte

**Hendan tíman konsertin vardi, førdi kórið okkum víða um. Frá italienskum huglagi í 16. øld varð skift til amerikansk/ írskar negrospirituals, við og uttan fylgispæl, har kórið rættiliga vísti at tey kunnu fáa løgini til at svinga teskandi pianissimo og brúsandi forte**

UMMÆLI
*Annette Nielsen*
*Myndir:J.K.Vang*
*Ltr: D.Olsen*



Leingi er tað, ið væl skal vera - meira enn 30 ár skuldu ganga, áðrenn kórið við føroyskum útisetum í Keypmannahavn kom sína fyrstu konsertferð til Føroya.

Við á ferðini eru 37 sangarar, umframt kórleiðaran Tórður á Brúnni, ið leiddi kórið við kønari hond - hansara tónleikaliga byrjan var ein sálmasúkkla í Skálavík fyri meira enn 30 árum síðani - sigast má at væl hevur hildnast.

Kórið endurspeglar ta sangtraditiónina, sum finst í Føroyum, har samanhald og sanggleði eru ein stórur partur av tí at syngja í kóri. Sum hjá flestu føroysku kórum var Hans Jacob Højgaard nýttur til eykalag.

Hendan tíman konsertin vardi, førdi kórið okkum víða um. Frá italienskum huglagi í 16 øld var skift til amerikansk/írskar negrospirituals, við og uttan fylgispæl, har kórið rættiliga vísti at tey kunnu fáa løgini til at svinga. Sjálvdan hevur "Deep River" verið framborðin so inniliga, við teskandi pianissimo og brúsandi forte.

Vit hoyrdu eisini sangir á donskum, norskum og svenskum, har kórleiðarin átti fleiri av útsetingunum. Lívsgleðin slapp rættiliga fram at, við orðunum hjá svensku skaldunum í sangininum "Længe leve livet".

Hæddarpunkti var frumframførslan av „Sólarmessa", ið Pauli Hansen hevur smíðað, til ein tekst hjá Tummas Napoleon Djurhuus. Verkið er ognað Húsakórinum.

Verkið er ein roynd at lýsa ein sólskinsdag , frá morgni til myrkurs. Byrjanin er messandi bassar í mun til skjóttgangandi sopran og altrøddir. So víkir myrkrið fyri ljósinum, og tónleikurin veksur í styrki. Skýmingin er lýst við einum einsligum tenortóna. Dagur er liðin og sangurin fjarðar burtur í náttini. Ein rík uppliving, ið avgjørt var verd at fara til.

Vónandi er hettar ikki seinasta konsertferðin Húsakórið ger til Føroya.

Høvið er at hoyra húsakórið í Vágs kirkju 14.10 kl. 20.00,

í Fuglafjarðar Kirkju 15.10 kl 20.00

og í Norðurlandahúsinum 16.10 kl 16.00.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Minningarorð um høgt elskaðu mammu mína

## Thurid Andreasen



Tað fellur mær tungt at skriva minningarorð um mína elskaðu mammu, sum andaðist 3. august 2004. Saknurin er stórur; tú fylti so nógv, og var altíð glað og so góð við okkum. Tú elskaði børn og okkum við, var altíð klár at hjálpa, og vildi okkum alt tað besta. Øll skuldu hava tað gott, soleiðis var tú, góða mamma.

Mamma og pápi okkara, Hjálgrím Andreasen av Oyrabakka, giftust 16. august 1942 og fingu tey 10 børn - 5 gentur og 5 dreingir. Tey gott og væl 49 árini, ið mamma og pápi untust at liva saman, góvu teimum bæði gleði og sorg. Ì 1969 mistu vit ein beiggja yviri í Amerika, Hjalgrím, kallaður Gimmi, bert 20 ára gamal.Tað var ein svár tíð at koma ígjøgnum, og eg kann minnast, at pápi segði, at Harrin legði ikki tyngri byrðar á okkum, enn vit megnaðu at bera.

Mamma bleiv einkja 21. maj 1992, knapt 3 mánaðar áðrenn gullbrúðleyp teirra, sum vit øll gleddu okkum til, men soleiðis skuldi tað ikki verða. Í 1999 misti mamma ein ommuson av eini vanlukku umborð á línubátinum Ågot, Pól Eyðfinn, bert 35 ára gamal. At missa sítt fyrstføddа ommubarn tók ómetaliga hart uppá teg, og viknaði tú nógv eftir hetta.

Vit vita, góða mamma, at tað var ringt hjá tær, tá tú brádliga var einsamøll, tú og pápi vóru so tætt knýtt at hvørjum øðrum. Tú hevði tíbetur okkum so tætt hjá tær, vit kundu altíð koma til tín, og tú til okkum. Tú hevði tað best tá tað var nógv lív í, og tú hevði nokk at síggja til. Berlina og Turid vóru so glaðar, tá omma kom til okkara, tí tað var altíð so hugnaligt at verða saman við tær. 22 oktober hevði tú, góða mamma, blivið 85 ár. Til hvørji jól og føðingardagar, bant tú pløgg til okkum øll, og sjómenninir vóru heldur ikki gloymdir. Tað verður tómligt á jólum, nú tú ikki ert ímillum okkum meir, men tú kemur altíð at verða í tonkum okkara. Vit hava so nógv góð minnir, góða mamma, vit hava tær og pápa almikið at takka.

Vit vita, góða mamma, at tað var ringt hjá tær, tá tú bleivst sjúk, og varð óhjálpin og ikki orkaði meira. Tó høvdu vit ta gleði at kunna vera um teg heima hjá tær og fjálga um teg, tað hálvt annað árið tú var sjúk. Vit vistu hvønn veg tað bar, men tað troystar meg í sorgini at vita, at tú ert hjá Jesuspápa, saman við teimum, tú hevur kær, heima í himlinum. Minnini eru nógv og góð, tey goyma vit í hjørtum okkara.

Má Harrin styrkja okkum í sorg okkara framyvir. Og vil eg enda við hesum sangi sum beiggi okkara Sigmund hevur skrivað. Við hesum fáu orðum vil eg lýsa frið yvir minnið um okkara elskaðu mammu, vermammu, ommu og langommu.

*Í Harrans hondum, í Harrans hondum,*
*Har ført tú hvílu, ja har er trygt.*
*Tað kanska stormar rundan um meg,*
*Men í Harrans hondum, eg hvíli trygt.*

*Ja, sum ein fuglur, við brotnum veingi,*
*Vil flúgva heim, men ei ber til,*
*so kennist tað í mínum barmi,*
*Tú kanst ei sjálvur, um tú tað vil.*

*Skulu vinir har vit aftur hitta,*
*Sum vit so sára syrgdu her,*
*Og hoyra kærar vælkendar røddir,*
*Honum syngja prís, vælkomin ver.*

**Lis við familju**

## Baldvin Baldvinsson 60 ár



Fríggjadagin 15. oktober fyllir kendi málarameistarin og ítróttarmaðurin Baldvin Baldvinsson í Havn 60 ár.

Frá unglinga minnist eg fryntliga vestmenningin Baldvin Baldvinsson frá miðbýnum í Havn.

Maðurin fór sum blaðungur til B36 at spæla fótbólt, og skjótt gekk framá. Hesin ágrýtni evnaríki spælarin kom skjótt upp í 1. deld at spæla. Hann hevði alt, sum aðrir droymdu um, kvikur skjeyt nógv mál, og ein av bestu spælarunum í landinum.

Hann spældi í 1. deild í 10 ár, frá 1964-1974. Bleiv settur sum framherji á landsliðnum, har hann spældi 5 landsliðsdystir og skjeyt 5 mál.

Baldvin fór í læru sum málari hjá Pola Smith í 1959 og gjørdist liðugur í 1965. Síðan hevur hann arbeitt sum sjálvstøðugur, og væl hevur gingist.

Tað sum sermerkir Baldvin er hansara vitan innan nærum allan fótbólt kring knøttin, men hann fylgir best við í enskum fótbólti, har hann er viðhaldsmaður hjá felagnum Tottenham.

Baldvin hevur ógvuliga lætt lyndi og altíð klárur við eini hjálpandi hond.

Stuttligt hevur verið at siti á Konditarínum hesi nógvu ár saman við tær og práta um mangt og hvat, vit loystu mangan verðinsproblemini og ikki minst fótbóltin úti og heima.

Vit hava havt mangar hugnaligar løtur heima hjá tær, har tú so óført heldur hús og varðar um tíni.

Vit gleða okkum at heilsa tær í B36-húsinum fríggjadagin 15. oktober fyrrapart.

Baldvin eigur fýra døtur: Sarita, Birita: Elin og Jóna, og tríggjar abbasynir: Rógvi, Baldvin og Jónas.

Vit heilsa tær á 60 ára degnum og ynskja tær nógv góð ár framyvir.

**Vinur**

†

Jarðarferðin hjá

**Evu Petronellu Næss**
**vanliga nevnd Nella**
**úr Havn**

verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 13.30.

# Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi,
tá ið okkara góði bróðir, mammubeiggi, pápabeiggi,
ommu- og abbabeiggi

**Niels Christoffer Mohr**
**á Sandi**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum á Áargarði og tøkk til prest fyri troystarrík orð.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Gunnvør og Borghild**

**85 ára føðingardagur**
Í dag, 14. okt., fyllir Astrid Gerðalíð 85 ár.
Dagurin verður hildin saman við børnunum.

## Dagurin

**14. oktober. Kalixtus**, deyður umleið ár 222. Trælur, sum gjørdist diakonur hjá pávanum og fekk um hendur at standa fyri jarðarferðum teirra kristnu. Summar av katakombunum bera navn hansara.

*Veturnætur*, vetrarhálvár byrjar.

